## Innbrot í bátar

Í leypi av leygarnáttini var innbrot í tveimum bátum í Álagerði. Nakað av neyðrakettum og neyðblussum var stolið. Eigararnir gjørdu vart við hetta sjálvir, men løgreglan hevur onki at ganga eftir í hesum málinum.

**- sae -**

## Gamal kenningur gongur aftur

Ein maður varð í rættinum undir grundlógaravhoyring mánamorgunin. Hetta er ein gamal kenningur hjá løgregluni, sum hevur verið ákærdur fyri harðsskap fyrr.

Hesuferð hendi harðskapurin uttan fyri Auto, har fólk boðaðu løgregluni frá, at tey høvdu yvirmannað ein harðligan mann.

Løgreglan tók mannin, og verður hann eisini skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Annars sigur vakthavandi, at tað hava verið fleiri smáttaríir um vikuskiftið. Nakrar ferðmátingar hava verið gjørdar, og í onkrum føri var talan um so mikið av ferð, at bilførarin helst missir koyrikortið.

**- sae –**

## Eftirlýsir vitnir

Løgreglan í eysturoynni eftirlýsir nú møgulig vitni í sambandi við neyðtøkuna av eini 18 ára gamlari gentu í Runavík leygarnáttina.

Løgreglan eftirlýsir ein silvurgráan persónbil, sum koyrdi framvið ástaðnum um tað mundi, at neyðtøkan fór fram.

Persónarnir í bilinum kunnu møguliga hava upplýsingar til málið, tí bilurin slakkaði av í tí hann koyrdi framvið, og møguliga hava persónarnir lagt tilmerkis eina kvinnu og ein mann tosa saman við Statoilstøðina í Runavík.

Eisini sigur løgreglan, at um onnur halda seg hava upplýsingar til málið, so vil hon fegin í samband við hesi.

Í sambandi við hendan tilburðin leygarnáttina eftirlýsir løgreglan ein mann, sum er umleið 28 – 30 ár, vanligur av vøkstri, umleið 176 cm høgur, myrkt stuttklipt hár og tunt yvirskegg. Maðurin hevur brún eygu, og hann var í einari bláari blusu ella T-troyggju við stuttum ermum og myrkum kovboybuksum.

Um fólk hava upplýsingar um hetta málið, kunnu tey venda sær til løgreglustøðina í Runavík á tlf 471448 ella í Havn á tlf 351448.

**- sae -**

## Sáttmáli fyri maskinmeistarar á landi undirskrivaður

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelag undirskrivaðu 8. juni 2004 nýggjan tvey ára sáttmála fyri maskinmeistarar á landi. Sáttmálin er á sama støði, sum hinir sáttmálarnir Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt, og hann er galdandi í tvey ár.

Í sáttmálanum eru avtalaðar hesar broytingar:

- Tann 1. mai 2004 hækkar lønin við 3,5%
- Tann 1. mai 2005 hækkar lønin aftur við 3,5%
- Eftirlønin hækkar við 1% 1. mai 2004 til 9%
- Eftirlønin hækkar aftur 1. mai 2005 við 0,9% til 9,9%.

Karmurin fyri lønarhækkingini er 8,7%, sum er tað sama sum hini feløgini hava fingið, við undantak av arbeiðarafeløgunum, har karmurin var 9,3%.

## Fólkaflokkurin nýggja starvsnevnd

Fólkaflokkurin valdi á fundi týsdagin 8. juni nýggja starvsnevnd. Tingmanning floksins hevði frammanundan valt síni umboð úr tingbólkinum.

Í starvsnevdini eru nú: Steintór Jacobsen, Norðragøta, formaður í starvsnevndini og floksskrivari, Guðrun Øregaard, Kollafjørður, kassameistari, Poul Laust Christiansen, Argir, skrivari, Martin Nielsen, Vatnsoyrar, Absalon í Buð, Hvannasund, Anfinn Kallsberg, Viðareiði, Jørgen Niclasen, Sørvágur.



*Jóannes Jakobsen ger EM-viðmerkingar í útvarpsstovuni saman við útvarpsvertinum Hans Kárason Mikkelsen*

# Jóannes Jakobsen á Rás 2

Fyrrverandi landsliðsleikarin og núverandi venjarin Jóannes Jakobsen fer at gera viðmerkingar á Rás 2 í sambandi við EM-endaspælið. Sosialurin ger tíðindi á Rás 2, og í tíðindasendingunum fer Jóannes at útgreina dystirnar, sum hava verið. Jóannes Jakobsen fer eisini at gera sær nakrar tankar um dystirnar, sum standa fyri framman.

– Eg fokuseri upp á tað reint fakliga í tí, altso hvat tað er, sum hendir inni á vøllinum. Eg eygleiði og fylgi væl við í hagtølum, tí ofta eru tað tendensir, sum eru, til dømis at flestu málini í teimum fyrstu dystunum komu upp á deyðbóltar, sigur Jóannes Jakobsen, sum fer at gera viðmerkingar til EM-endaspælið í Portugal hvønn gerandisdag á Rás 2.

Umframt Jóannes Jakobsen fara aðrir fótbóltskønir persónar at gera viðmerkingar av og á, men Jóannes verður at hoyra hvønn dag.

Tíðindi á Rás 2 eru klokkan 12:00, klokkan 16:00 og klokkan 18:00 hvønn gerandisdag.

### Rás 2 – FM 102,0

| | |
|---|---|
| Tórshavn | 102.0 MHz |
| Vestmanna | 102.5 MHz |
| Sørvágur | 102.5 MHz |
| Suðuroy | 102.6 MHz |
| Sornfelli | 106.0 MHz |
| Støðlafjall | 106.5 MHz |
| Brúnaskarð | 107.0 MHz |
| Eysturhøvdi | 107.5 MHz |
| Miðvágur | 107.5 MHz |

# Páll Finnur Páll á G!

**FESTIVALUR**

Hvør Finnur hvønn á G!? Svarið er einfalt: Páll Finnur Páll á G!, og har fer millum annað at verða borðreitt við ársins stóra útvarpshitti og landaplágu frá í fjør, Forelskaður Sjónleikari, sum setti met á 15 teim bestu við 43 vikum á listanum, harav 10 vikur á fyrsta plássi

Á skránni verða, umframt áðurnevnda Forelskaða Sjónleikara, eisini onnur løg, ið hava roynt seg á 15 teim bestu, GOA Land og Drykkju/Kærleiksvísan, eins og áhoyrarar kunnu vænta at hoyra onnur løg frá fløguni, Bermenn, umframt nýggj løg, sum verða við á næstu fløguni, ið eftir ætlan verður givin út seinni í ár.




Tónleikurin hjá Páll Finni Páll er settur saman sum eitt passaligt bland av fólkatónleiki, brit poppi, og nakað harðari tónum, parað við bæði fittum kærleikssangum og "óhóskandi fyri børn" ónærisligheitum – alt hetta, boðið út við einum undirspældum skemtiligum og ironiskum undirtóna.

Páll Finnur Páll, eru eftir stuttari tíð eru vorðnir fólkaogn millum føroyskan ungdóm, og teir møta upp á G! við sterkastu manning, seks manns, umframt ein gittarleikara afturat. Eyka gittarin er fyrst og fremst við fyri at kunna spæla tvær-streingaðar soloir, júst sum soloir eiga at spælast – í ektaðum 80´ara stíli.

Manningin í PFP er henda: Páll O. Rubeksen, sang og gittar, Finnur Jensen, sang og gittar, Páll G. Hammer, tangentar, Høgni Fagraberg, el-gittar, Ísak Sambleben, bass, Eyðun Egilstrøð, trummur.



